

# Starvsfólk til Tax-free goymsluna

Søkt verður eftir starvsfólki til Tax-free goymsluna hjá Atlantic Airways.

**Arbeiði fevnir um:**
Alt goymsluarbeiði í sambandi við handfaring av tax-free vørunum.
Somuleiðis kemur viðkomandi at taka eina hond við í handling av viðføri.

**Førleikar**
Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin:
- hevur kunnleika til goymsluarbeiði
- hevur koyrikort til trukk
- hevur evni at samstarva og er ágrýtin
- kann arbeiða sjálvstøðugt
- hevur góðan røkjuskap

Vit bjóða eitt áhugavert starv við skiftandi arbeiðstíðum í einum góðum og dynamiskum umhvørvi.

Starvsfólkið skal setast skjótast gjørligt, og setanartreytir verða avtalaðar nærri við setan.

Skrivlig umsókn við møguligum prógvum og viðmælum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi **mánadagin 4. september 2006**. Nærri upplýsingar kunnu fáast um starvið hjá Inga Joensen, Tax-free leiðara á tlf. 34 10 90 ella e-mail: ingi@atlantic.fo.

Umsóknin skal sendast til:
Atlantic Airways, Steinbjørn Hardlei, starvsfólkaleiðari, Vága floghavn, 380 Sørvágur.

www.sansir.fo

Atlantic Airways er ein altjóða fyritøka við heimstaði í Sørvági. Umleið 180 fólk starvast í føroyska tjóðarflogfelagnum, og árligi umsetningurin var 378 milliónir krónur í 2005. Atlantic Airways hevur seks flogfør og tvær tyrlur undir sínum veingjabreiði. Flogførini røkja rutusamband úr Føroyum til ymsar býir í Danmark og grannalondunum Onglandi, Skotlandi, Hetlandi, Íslandi, Grønlandi og Noregi. Virksemið veksur í øðrum londum, og umleið ein triðingur av inntøkunum kemur úr útlondum. Tyrludeildin røkir ferðasamband til útoyggjarnar, leiti- og bjargingartænastu og off-shore flúgving í Norðurhøvum.

ATLANTIC AIRWAYS

Atlantic Airways ger tað stuttligari at liva í Føroyum — www.flyfaroe.com

# BRÚKTAN JEEP

*Vit úvega sera góðar og bíligar, brúktar Jeepar úr Kanada*



*Ring og frætta nærri*

**STUBBIN**
Fjarðarvegur 12 · Vestmanna
Tlf. 471 800
www.stubbin.fo
stubbin@stubbin.fo

# Summarhús



Vit hava eitt av summarhúsunum til framsýningar í Vestmanna

Sera vælútgjørt, 2 sovikømur, køkur við køliskápi/frystiboks, komfýri og eymhettu. Baðirúm við WC, vaski og stórari brúsukabinu. El, vatn v.m. Alt liðugt installerað.

**Prísur úr einans 187.500 v/mvg.**

*Ring og frætta nærri*

**STUBBIN**
Fjarðarvegur 12 · Vestmanna
Tlf. 471 800
www.stubbin.fo
stubbin@stubbin.fo

TEAM85




# Samskiftisfólk at menna felags portal

**Fyri at styrkja kunnleikan til og marknaðarføringina av føroyskari ferða- og útflutningsvinnu sóknast Ferðaráð Føroya og Menningarstovan eftir Samskiftisfólki at menna ein felags portal við heimasíðum og heimasíðuskipanum á enskum og føroyskum.**

Sum Samskiftisfólk verður tað tín uppgáva at menna ein portal, ið á ein lættan og einfaldan hátt gevur brúkarum atgongd til at finna viðkomandi heimasíður og upplýsingar, sum tørvur er á.

**Førleikakrøv**
Vit ímynda okkum, at tú:
- er væl fyri í enskum á høgum handilsligum stigi,
- hevur áhuga fyri og innlit í avbjóðingarnar hjá føroyskari ferða- og útflutningsvinnu, og samstundis kennir avbjóðingarnar hjá útlendskum íleggjarum í Føroyum,
- við áhuga tekur lut í øllum verkætlanum og tænastum, sum føroyskir brúkarar av portalinum vilja leggja út á alnetið,
- hevur førleika at kravfesta menning av verandi og nýggjum skipanum til portalin, og tryggja, at skipanir samsvara kravfestingini, tá hesar verða settar í verk á portalinum.

Tú hevur innlit í og fatan av, hvussu ferðafólk, útlendsk og føroysk vinna, íleggjarar og íverksetarar brúka alnetið. Tú hevur holla samskiftis-, búskapar- ella marknaðarútbúgving. Eisini hevur tú royndir at leiða verkætlanir og dugir væl at samskifta.

**Setanarviðurskifti**
Tú byrjar í starvinum 2. oktober 2006 ella sum skjótast. Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsókn**
Umsóknin skal í seinasta lagi 15. september 2006 sendast til

Ferðaráð Føroya
Undir Bryggjubakka 17
100 Tórshavn
Att.: Per Hansen, stjóri

Spurningar í sambandi við starvið kunnu setast til Per Hansen, stjóra á Ferðaráðnum, tel. 355 800 ella Kjartan Kristiansen, stjóra á Menningarstovuni, tel. 353 100.

Ferðaráð Føroya er stovnur, hvørs endamál er at menna Føroyar sum ferðamannaland og kunna um og marknaðarføra Føroyar sum ferðamál. Tí vendir Ferðaráðið sær á enskum, donskum og føroyskum til ferðafólk og ferðafyriskiparar við áhuga fyri Føroyum við upplýsingum og marknaðarføring av fjølbroyttu flutnings-, gistingar- og ferðavinnutænastunum í Føroyum.

Menningarstovan skal menna føroyskan ídnað, handverk og tænastur, og vendir sær á føroyskum og enskum til útlendska og føroyska vinnu og vinnuáhugað við upplýsingum um vinnur, fyritøkur og vinnuligar karmar í Føroyum, og við leiðbeiningum til útflutningsfyritøkur og íverksetarar.

Arbeitt verður við at leggja Ferðaráðið og Menningarstovuna saman í ein stovn. Setanarviðurskiftini verða tá flutt til nýggja stovnin. Tann, ið settur verður, skal tí vera til reiðar at taka við skipanarligum broytingum.

Ferðaráð Føroya

Menningarstovan
Faroe Islands Trade Council